DAGSINS MEINING

Blokkniðurskurður og fíggjarlóg

Formaður Tjóðveldisfloksins hóreiggjaði sær óført í útvarpinum herfyri, um hvussu flokkar hava bóltað rút og annað. Varaløgmaður, og løgið nokk ikki løgmaður, kommenteraði landsfundarsamtyktir hjá størsta andstøðuflokki við retorikki um at 80'ini og fylgjandi 90'ini fóru at koma umaftur, um Javnaðarflokkurin fekk makt sum hann hevði akt.

Nú kundi tað næstan ljóðað sum um tað var Javnaðarflokkurin, sum var lopin á leistum og hevði skorið blokkin niður við hálvtfjórðhundrað milliónum við einum pennastroki, men so er ikki. Samgongan hevur strongt búskapin óneyðugt við hesari bráu gerð nakrir mánaðar áðrenn valið. Fáa vit eina búskaparkreppu í næstu framtíð, so er adressan greið.

Tað er gott, um andstøðan hevur eitt alternativ til fíggjarlógina hjá samgonguni, tí ikki eru vónirnar góðar fyri einari semju millum andstøðu og samgongu á hesum øki — sjálvt ein samgongusemja tykist ivasom. Vit vita hvat melodiurin verður frá nú av. Hvørja ferð tiltrongdar ábøtur ella justeringar fara at verða umrøddar, so kemur altíð spuringurin hvussu hetta nú skal fíggjast.

Svarið er púra greitt við at minka blokkniðurskurðin til eina meira hóvliga gongd. Hevur man ikki ráð til at reka vælferðarsamfelagið Føroyar í 2002, so leyp samgongan framav tá hon sendi hálvtfjórðhundrað milliónir retur til Nyrup fyri fíggjarárið 2002.

Vit vita hvar fíggingin á tiltrongdu ábøtunum ikki skal koma frá. Palliba er nóg mikið skattaður sum er. Samgongan og ikki minst Fólkaflokkurin mugu gera sær greitt, at um alneyðugu ábøturnar á samfelagið ikki kunnu fíggjast útfrá landskassans inntøkum sum er, so má antin blokkniðurskurðurin minkast ella má man fara, har pengarnir eru. Teir eru ikki hjá Palliba, so skattahækking og MVG hækking kemur ikki uppá tal.

So er tað, at man kann seta seg at hugsa um, hvussu ein av lægstu partafelagsskattum í Europa sampakkar við vælferðarsamfelagið Føroyar við einari hálvtfjórðhundrað milliónir minni heildarveiting næsta ár. Eins og borgarin má gera sær greitt, hvat ein minni heildarveiting merkir, so eigur vinnan eisini at hugsa um hetta álvarsmál. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava tíverri ikki upplýst fyri nøkrum, hvat konsekvensirnar verða av blokkniðurskurðinum, men eingin ávirkan er ikki svarið, tí blokkurin hevur verið medvirkandi til, at skattir á avgjøld á vinnuna eru lægri enn um eingin blokkur var.

Sosialurin

”burturhugur”– nú á Strondum

Hattarvík

TÍÐINDASKRIV

Nýggi føroyski filmurin burturhugur, sum Teitur Árnason hevur leikstjórnað, tekur støði í bygdini Hattarvík í Fugloy og í eisini poesii. Staðið sjálvt og umhvørvið sleppa at seta sín dám á filmin, skýggj, sól, traktorar, fuglar, vindur, kirkjan og havið verða flættað saman við frásagnum hjá teimum teimum 7 fólkunum, sum búgva har um aldaskiftið 2000.

Hetta er eitt slag av dokumentarfilmi, skilt á tann hátt, at hann leggur seg eftir at geva eina mynd av tilveruni í bygdini, soleiðis sum hesi 7 fólkini uppliva hana.

Men tann,ið væntar sær nágreiniligar frágreiðingar um seyðahald, fisk ella bygdamenning, verður bilsin. burturhugur er øðrvísi á tann hátt, at hann fer heilt tætt at fólkunum, letur tey sjálv siga frá um tankar, dreymar, ótta, skemtiligar søgur og um, hvønn týdning lívið í bygdini hevur fyri tey.

Hetta verður gjørt á gerandisligan og livandi hátt, sum samstundis gevur rúm fyri bæði álvara og nógv um menniskjað sum veru, um okkara tilveru, hvussu tilvildarligt tað er, hvørji vit eru, hvussu vit verða merkt av okkara umstøðum, hvar vit vóru fødd, hvar vit hoyra til, hvat gevur meining fyri okkum, hvat heldur okkum føstum, har vit eru, hvat eru vit góð við, osfr.....og hetta ger filmin áhugaverdan hjá flest øllum at síggja.

burturhugur er fyrsti filmur, sum filmsframleiðslufelagið feelgood films framleiðir.

Stuðlað filminum hava: Mentamálastýrið, Danskfærøsk kulturfond, Clara Lachmanns Fond, Fjølrit, Forlagið Fannir, Atlantic Airways, Færøernes Kommando, Norðoya Sparikassi og Fugloyar Kommuna.

Høvi verður aftur at síggja filmin komandi vikuskifti. Hesuferð inni á Strondum. Fríggjakvøldið klokkan 21.00 mala filmshjólini aftur inni í Stranda Bio. Onnur sýning verður leygarkvøldið klokkan 20.00, og triðja og seinasta sýning sunnukvøldið klokkan 19.00. Hetta verður ivaleyst eisini seinasta høvið hjá føroyingum at síggja filmin á hesum sinni.

Filmurin er 1 tíma til longdar. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf.: 447182 og á fartlf. 216500. Tey skulu avheintast 1 tíma undan sýning.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ítrótur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ferðaleiðari í Kangerlussuaq

Ferðafólkini, sum koma til Kangerlussuaq, leggja væl av peningi eftir seg, sigur Tom Vilhelm, sum rekur feðravinnu á staðnum

Mynd: Edvard Joensen

Millum tey 500-600 fólkini, sum búgva í Kangerlussuaq, er vágbingurin Tom Vilhelm, sum rekur ferðavinnu á staðnum

FERÐAVINNA
Edvard Jensen

Kangerlussuaq:
Møguleikarnir eru nógvir og bíða bara eftir at verða brúktir. Tann, sum dugir at gagnnýta grønlendsku náttúruna, kann vinna pening burtur úr ferðavinnuni, sigur vábingurin Tom Vilhelm, sum býr í Kangerlussuaq í Grønlandi.

Fullsetta flogfarið hjá Atlantsflog, sum flytir luttakarar til Vestnorden Travel Mart ferðavinnumessuna í Ilulissat í Grønlandi, lendir á longu flogbreytini í Kangerlussuaq - Sdr. Strømfjørd - í Grønlandi, og ferðafólkini skunda sær út. Einir 20 føroyingar eru við, meðan íslendingarnir, sum komu við, tá millumlent varð í Reykjavík, eru umleið 60 í tali.

Farið verður eftir viðførinum, sum verður checkað inn aftur till Ilulissat beinanveg, og so er bara at bíða teir stívliga tríggjar tímarnar, til flogið verður víðari.

Tað kemur ein fryntligur maður framvið við einum borðiski í hondini.

-Tú átti at fingið tær hetta. Tað er muskusoksakjøt, sigur hann á Suðuroyarmáli, í tí hann fer framvið og setir seg við eitt borð longri inni.

Eg fylgi ráðum hansara og angri tað ikki. Tá eg havi fingið mítt, fari eg at leita mær eftir plássi. Har situr hesin sami maður við eitt borð ov býður mær at seta meg niður.

Jú, hann býr her, Er vágbingur og eitur Tom Vilhelm. Hevur búð her síðan 1994, greiðir hann frá. Er giftur grønlendskari konu, og familjan trívist væl her yviri.

Hava flutt nakað

Familjan Vilhelm hevur flutt eitt sindur, greiðir Tom frá. Tey hava búð í Klaksvík, New York, Vági og nú her í Kangerlussuaq.

Sjálvur er hann útbúgvin politistur og arbeiddi í fimm ár sum politistur í Klaksvík.

Eftir tað vóru tey eitt ár við donsku sjómanskirkjuna í New York og komu so aftur til Føroya, har Tom gjørdist portørur á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Men í 1994 flutti familjan til Grønlands, og her hevur teimum dámt sera væl, greiðir Tom Vilhelm frá.

Børnini hava gingið í skúla. Konan arbeiðir á flogvøllinum í Kangerlussuaq, og sjálvur hevur hann eisini sína dagligu gongd har.

Og hann kennir seg heima her í stórbæru grønlendsku náttúruni, sum hann eisini brúkar til annað enn at vísa fremmandum ferðafólki.

- Vit vóru nú hendan dagin og royndu at skjóta okkurt reinsdjór, greiðir hann frá. Men har gjørdist einki. Teir hava veitt nú eina tíð, og reinsdjórini eru vorðin heilt sansaleys. Fyrsta tey síggja fólk, taka tey til beins, og tey renna so langt, vit síggja tey.

Men hann ætlar at fara avstað aftur kortini. Og ber tað til, ætlar hann eisini at fáa ein moskusoksa.

Tað er ikki ómøguligt, og hann hevur eisini einaferð skotið ein, veit hann at siga.

Ein flogvøllur

Kangerlussuaq er ein flogvøllur. So er tað mesta sagt um staðið. Tí alt, sum hendir her, snýr seg um altjóða flogvøllin.

Eini 500-600 fólk búgva her, og tey hava allar hentleikar, sum einum samfelag hoyrir til. Handil og hotell. Ítróttarhøll, svimjihyl. Barnagarð, skúla og hvat sum helst. Alt er bygt upp rundan um flogvøllin, sum hevði sínar vælmaktsdagar, tá amerikanarar hildu hann vera neyðugan í kalda kríginum. Men samstundis sum Berlinmúrurin fall, gjørdist alt hetta eisini óneyðugt, og tí eru bara sivil áhugamál her í dag.

Eitt sláturvirki er eisini, sum teir brúka, tá teir hava verið og skotið moskusoksar, greiðir Tom Vilhelm frá.

Teir hava flutt moskusoksar úr Eysturgrønlandi hendanveg, og tað vísir seg at bera heilt væl til. Skipanin er vaksin munandi, og lætt er vanliga at fáa eyga á teir, tá koyrt verður hendanveg við ferðafólki.

Vit eru á veg niðan á eitt fjall oman fyri bygdina. Haðani er gott útsýni bæði út gjøgnum fjørðin og langt inn á innlandsísin.

- Har inni, greiðir Tom frá, hevur VW sínar royndarkoyringar, tá teir royna nýggjar bilar. Eina breyt góðar hundrað kilometrar heimaftur eftir at hava siglt í Norðuratlantshavi. Teimum fólkunum vinna vit væl av peningi burturúr, tá vit gera túrar við teimum, sigur hann.

Talan er mangan um somu skip, sum hava verið í Føroyum og Íslandi. Skip við fólki, sum føroysk ferðavinna so seint sum í summar hevur látið at í bløðunum, bara leggja nakrar heilt fáar krónur eftir seg í Føroyum.

Tað heldur Tom Vilhelm vera løgið, tí í Grønlandi vinna tey væl av hesum fólkunum.

Tey verða heintað í havnini og koyrd niðan til flogvøllin. Fáa so tilboð um at royna eitthvørt, sum tey kunnu bjóða her. Til dømis hevur Tom eitt nú ríðitúrar inni á ísinum.

Vit venda okkum móti setandi sólini, langt, langt har úti einastaðni. Lágt stendur hon, nú út er liðið bæði á árið og kvøldið. Hon sker í eyguni, og ger hvassar skuggar oman gjøgnum brúnu liðirnar.

Ferðamaðurin rindar

- Har úti aftan fyri nesið, tú sært, er havnin hjá okkum, sigur Tom og peikar. Hon liggur einar 15 kilometrar hiðani. Og har koma vanliga fleiri ferðamannaskip um summarið, sum seta fólk av, ið skulu flúgva á íslandsrossum at bjóða.

Ferðafólkini kunnu koyrast runt ella bara fara ein gongutúr, har geitt verður frá staðnum.

- Tað ræður um at hava okkurt at bjóða, tí tey gjalda fyri tað, tey fáa, sigur Tom Vilhelm.

Hann nevnir eitt dømi um eitt av skipunum, har eini trý fólk høvdu keypt sær føroyskar troyggjur, tá tey vitjaðu Føroyar tíðliga á túrinum. Í Kangerlussuaq hevði Tom nakrar troyggjur av sama slag hangandi, og tá hesi fólkini sóu tað, vórðu tær seldar beinanveg.

Hesi tvey, trý fólkini, sum keypt høvdu í Føroyum, høvdu marknaðarført troyggjurnar á túrinum til Grønlands. Tað gjørdi so, at peningur varð vunnin úr teimum í Grønlandi heldur enn í Føroyum, har tær av røttum áttu at verið seldar, vísir Tom Vilhelm á.

Tað skýmir alsamt. Aftan fyri okkum melur ein viti her uppi í luftini at kalla. Hann er í grundini ikki til nakra nyttu, heldur Tom. Hevur bara verið har og fær tí frið at standa.

Vit fara inn aftur í bilin og koyra oman móti vøllinum. Og mín sann um ikki ein moskusoksi liggur so einsamallur á biti har niðri í haganum.

- Honum man onkur fara eftir fyrsta dagin heldur Tom, meðan vit í alsamt tiltakandi skýmingini koyra oman aftur á farstøðina, har flogarið, sum skal flyta meg norður til Ilulissat, er væntandi.

Øll bygdin er miðsavnað um tann knappliga 3.000 metra langa flogvøllin

Mynd: Edvard Joensen